# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Símun Einarsson

Eg hevði verið í Havn eini ørindi. Tá eg komi niðan á Háls, síggi eg Ran kemur inneftir millum Stong og Eystnes. Tankarnir fóru beinan vegin til Símun. Eg skuldi til Lamba eini ørindi, og tá eg komi hagar, stendur Sonja klár at fara til Oyrar eftir Símuni.

Eg geri ørindi míni liðug og skal fara vestur aftur til Vágarnar, og í tí eg koyri oman á Lambareið, hyggi eg niðan til Símun og síggi at bilurin stendur í túninum. Koyri nakað, men hugsi so, lat meg líka biðja Símuni væl afturkomnan, so eg vendi og koyrdi niðan.

Tey sita og eta nátturða, og ein gestur er eisini inni, sum eg ikki kendi. Eg heilsi, so sigur Sonja, at gesturin hoyrir ikki, og eg síggi Símun tekur penn og pappír og skrivar niður og rættir gestinum, hann presenterar meg fyri honum á tann hátt. Lagið var gott og vit fáa eitt stutt prát um túrin. Hetta er seinasta livandi minni, eg havi um Símun. Annan dagin eftir fara konan og eg av landinum at ferðast.

Mánamorgunin 8. Oktober, í Oslo, vakni eg av at fartelefonin ringir og eg hoyri at Jóni, svágur, er í hinum endanum. Í hugaheiminum fór eg beinan vegin at seta navn á, hvør er tað hesaferð. Men tá hann segði, at tað var Símun, var sum alt steðgaði upp. Tað kundu verið fleiri onnur, sum stóðu fyri tørni áðrenn hann, men hesaferð bleiv tað hann, bert 52 ára gamal

Okkara leiðir komu saman, tá Símun giftist við Sonju, sum er systir konu mína, og vit hava havt mangar góðar løtur saman síðani, bæði á sjógvi og á landi. Ikki minst nýggjársaftan til ræst kjøt uppi hjá teimum, næstan øll árini.

Símun var úrmælingur á sjónum, hevði sjónatúr sum fáur, nervar av stáli og serligt hegni til at fáa fisk.



Hetta umfatar bæði tann vanliga fiskin, men ikki minni tann alternativa, sum búrfisk, háv, stinglaks og kongafisk. Hann hevði altíð okkurt spennandi í huganum, sum hann kundi hugsa sær at roynt. Hann leitaði upp nýggjar leiðir og hann hevur verið við at ført mangan dýran fong til lands, bæði við Ametyst, Boðasteini, Rock Amador og nú seinast við Ran.

Bæði fransmenn, Írar og danir ringdu hann upp og fransmenn vóru her heima, fyri at fáa hann umborð á teirra skip, tí teir fingu tað ikki at bera til, at fáa búrfisk, men Símun lat seg ikki keypa. Hann vildi varveita hesa vitan her heima.

Símun var so hjálpsamur. Eg heitti mangan á hann um hjálp, og hann bar seg ikki undan. Um tað so var dagin fyri, at hann skuldi avstað, so kom hann vestur at fletta, um eg var burtur, ella ikki livdi væl.

Saknurin er stórur. Tað er sum um, at tað ikki er satt, sum um hann er á túri og skal koma aftur. Men so verður ikki hesaferð.

Svárast er hjá tykkum, Sonja, Sigurjón, Sóley, Sámal, lítla Pól, lítla Bjørk og svigarbørn, sum hann elskaði so høgt og ofraði seg so nógv fyri. Eisini verforeldrini, Jógvan og Edith, sum hann var so góður við og tey við hann og systkini hjá honum.

Høvdu tit tað gott, hevði hann tað eisini gott. Hevði nakar av tykkum tað ikki gott, so hevði hann tað heldur ikki gott

Orð eru fátøk í slíkum umstøðum." Sum dagar tínir skal styrki vera!" stóð á sangblaðnum til jarðarferðina. Hetta er bøn mín, at tit skulu fáa styrki frá Guði, sum dagarin eru.

Símun, eg havi so nógv at takka tær fyri, eg hevði so stóra virðing fyri tær. Tað var so nógv brúk fyri tær nú, ikki minst heima. Saknurin er stórur, men vónin er, at vit aftur skulu møtast heima hjá Guði, fyri aldri aftur at skiljast .

Stutt undan deyðsdegnum, sat eg inni hjá mammu, á ellisheiminum. Vit koyrdu bandið við møti umborð á Høganesi frá. Har sat tú millum aðrar og sang millum annað:

*Lat akker falla! Eg náddi havn,*
*farvæl, tú ótrygga bylgja!*
*Eg leggi meg í hans kærleiksfavn,*
*sum trúgvur mær vildi fylgja.*
*Hoyr, kendar røddir meg bliðar kalla,*
*nú stilt mítt akker man niður falla*
*í tryggu, sælu hvíldarhavn!*

Símun mágur og vinur, nú er tú komin í havn. Takk fyri tað vit fingu saman. Hvíl í friði.

**Ingolf**

† 

## Andlát og jarðarferðir

**Andreas Signar Dalfoss** vanliga nevndur Signar Dalfoss andaðist Alla halgannardag á Landssjúkrahúsinum 61 ára gamal.

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt, heiðraðu meg á 60 ára degnum.

**Bestu heilsanir**
**Kristian Martin Eliasen**

**Dagurin**
**6. november. Leonhardus,** deyður umleið ár 570. Munkur og trúboðari í Fraklandi. Hann legði ikki í at vera valdur til biskup. Kundi øll lás og allar leinkjur at loysa og gjørdist verndarhalgimenni hjá lásasmiðum og fangum. Navnið er týskt og merkir leyva og harður.




## Heilsan til Knút og Jonnu Larsen


*Jonna og Knút Larsen*

Í dag 5. november fyllir Knút Larsen í Fuglafirði 70 ár.

Knút hevur verið snikkari alt sítt virkna arbeiðslív. Hann var við í snikkaravirkinum á Kambsdali og hevði eisini verkstað í kjallaranum. Hann plagar at siga, at hann fekk ta fyrstu maskinuna í kjallaran tann dagin, Terji varð føddur.

Knút hevur verið raskur og sera nærlagdur í sínum arbeiði, og ofta hava boð verið eftir honum til serligar snikkarauppgávur so sum í ymsum kirkjum kring landið.

Knút er trúgvandi maður, og hann góður talari, bæði tá tað snýr seg um tað góða orðið, men eisini við okkurt skemtiligt hvi. Hann er hjartagóður, og Valgerð sigur, at hann hevur verið sum ein pápi fyri seg.

Knút er giftur við Jonnu, sum fyllir 65 tann 12. desember. Tey bæði eiga níggju børn, fimm dreingir og fýra gentur. Fimm av børnunum búgva í Danmark - trý í Aalborg, eitt í Keypmannahavn og vit í Esbjerg.

Jonna er ein av hesum kvinnunum, sum fáa alt frá hondini uttan at kæra seg um nakað. Hon er røsk, hjálpsom og altíð í góðum lag. Hon er fitt í hondunum og hevur bundið manga góða troyggjuna upp á børn og ommubørn.

Jonna er sera rólig og sinnilig, og hon hevur verið okkum ein góð vermóðir, móðir og omma. Dóttir okkara, Jonna Eva, er uppkallað eftir henni.

Góðu tit bæði. Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku við døgunum og takka fyri tær mongu góðu løturnar í tykkara hugnaliga heimi. Vónandi fáa vit nógvar afturat har, eins og vit eisini vóna at síggja tykkum skjótt aftur her niðri.

**Terji, Valgerð, Jonna Eva, Teitur og Rúni**